# Dani sýnir fram akrylmálningar í Lítlu Vík

**-19 ára gamal dani hevur inntil í morgin framsýning av akrylmálningum í Smiðjuni í Lítlu Vík**



*19 ára gamli Mads Heinesen avmyndaður við einum málningi uttanfyri Smiðjuna í Lítlu Vík*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

LIST
*Ingrid Bjarnastein*

23 akrylmálningar hava seinastu vikuna prýtt Smiðjuna í Lítlu Vík. Ungi danin, Mads Heinesen, er tann, ið hevur staðið við pensli í hond.

Málningarnir hava allir ymiskar stílir og snið.

Grundin til at hann vísir fram í Lítlu Vík er, at gentan er úr Føroyum, og nú eru tey komin upp her at vera í eitt hálvt ár.

Mads Heinesen hevur teknað síðani hann var barn, men akrylmáling hevur hann bert fingist við í tvey ár.

Framsýningin hevur verið hampuliga væl vitjað. Seinastu dagarnar hava tó ikki verið so nógv fólk, men hann vónar at undirtøkan verður betri í dag og í morgin. Seinasti møguleiki at síggja málningarnar hjá Mads Heinesen er í morgin, sunnudagin, 7. oktober.




# Arkitekturin í vatnlitum



LIST
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í dag klokkan tvey letir arkitekturin og listamaðurin Høgni Larsen upp eina framsýning við vatnlitstekningum. Seinastu drúgvu tíðina hevur Høgni Larsen gingið runt í Havnini og teknað grannaløg og gøtir.

Høgni hevur eyga fyri at býarmyndin broyttist og hann veit at fotomyndir er ikki tað saman sum tá ein teknar og litgevur við egnum hondum og eygum.

Á framsýningini verða ikki færri enn 45 vatnlitstekningar úr Havnini, so her liggur drúgvt arbeiði aftanfyri.

Høgni Larsen er kendur sum arkitekturin aftanfyri Fríðrikskirkjuna á Nesi.

Framsýningin verður í egnum hølum í Løkjutúni 1 á Argjum. Framsýningin er opin leygardagin frá klokkan 14-18 og somuleiðis sunnudagin. Mánadagin til fríggjadagin í komandi viku frá klokkan 16-19 og komandi leygardag frá klokkan 14-18.

Rasmuss Rasmussen:

# *Forelskaður* – í grannaløgum



LIST
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Hvør annar sær nakað vakurt í gomlum hjallum, tyngdum húsatekjum og rustaðum zinkgalvum. Hjá Rasmuss Rasmussen loypa hesar myndir beint inn á ljóstalvuna og hann sær motivir allastaðni har hann ferðast. Og tað sum Rasmuss leggur til merkis er als ikki privat, tí av og á sýnir hann fram sínar eygleiðingar. Og tað er júst tað sum hendir í komandi viku, tá ein framsýning letir upp á Torginum í SMS.

Myndirnar eru í pappírsklippi og eru úr øllum landinum. At Rasmuss er forelskaður í grannaløgum gongur tíðuliga fram á myndunum. Og tað eru ikki bara serlig grannaløg hann teknar. Hann sær meira enn tey flestu og gjørgnum grønu brillurnar ger hann okkum eisini vart við tað sum veksur og at føroyingar hava nógv grønari fingrar, enn hvat ein skuldi hildið.

Framsýningin á Torginum gevur eisini møguleika fyri at práta við listarmannin. Sum ein rættur Restorffari, so er hann heldur ikki skorin fyri tungubandinum og tað kann gott henda, at hann finnir upp á at fortelja eina vittigheit, sum eisini kann vera skemtilig.

Framsýningin er opin komandi vikuna.



# Bush fyrireikar hjálparpakka

**Amerikanski forsetin, sum higartil hevur roynt at birta lív aftur í amerikanska forbrúkaran, stendur nú aftur klárur við einum búskaparligum hjálparpakka. Stigini eru alneyðug um amerikanska búskapinum skal vera lív lagað, meta serfrøðingar**



*Álopini 11. september hava sett síni spor í amerikanska samfelagnum. Nú verður forsetin aftur at fáa forbrúkararnar ígongd.*

BÚSKAPUR
*Heri á Rógvi*

Støðan hjá amerikanska búskapinum er ikki stórvegis góð í løtuni. Yvirgangsatsóknirnar í síðsta mánað hava sett síni spor, og amerikanska stjórnin roynir í løtuni at fremja tey neyðugu átøkini, soleiðis at gongd aftur kann fáast á amerikanska búskapin og amerikanska samfelagið.

Búskaparfrøðingar vísa á, at Sambandsríkið væl sagtans kann vera á veg móti einari búskaparligari afturgongd. Tá amerikumenn sipað til búskaparliga afturgongd ella »recession« verður ein negativur vøkstur á BTÚ tvey fylgjandi kvartal nýttur sum grundarlag. Tað verður víst fleiri staðni, at støðan hjá amerikanska búskapinum frammundan atsóknunum í New York og Washington ikki var tann besta. Serfrøðingar vilja vera við, at øll skyldin ikki skal leggjast á álopini í farna mánað.

Bjargingin frá einari tílíkari støðu tykist at vera forbrúkarin. Tað vil siga somikið sum, at tað er alt avgerandi, at álitið hjá forbrúkarunum verður endurreist. Tað er nemliga eisini hetta, sum Bush ætlar sær í holt við. Higartil hevur amerikanski forsetin veit stuðul til hjálpararbeiði og til kreppuraktu flogfeløgini.

Nýggjasta ætlanin skal, sambært amerikonskum fjølmiðlum, syrgja fyri at endurreisa forbrúkaraálitið, seta gongd aftur á íløgurnar og loysa partar av arbeiðsloysis spurninginum.

### Kann bera til

Hóast búskaparligu afturstigini, so er tað framvegis ein ávís optimisma at hóma. Sjálvt millum tungu dreingirnar í búskaparheiminum, búskaparfrøðingar, eru ábendingar um, at nýggjasta ætlanin hjá amerikanska forsetanum kann fara at geva úrslit.

Metingarnar sipa til, at tað er neyðugt at føra eitt slag av ekspansivum fíggjarpolitikkin, um amerikanska búskapinum, og harvið heimsbúskapinum, skal vera lív lagað.

Støðan í dag minni kanska eitt sindur um støðuna í tríatiárunum hjá Roosevelt og hansara monnum. Búskaparfrøðingur, sum Sosialurin hevur tosað við, vísir á, at tað tá var talan um ein reina útboð og eftirspurnings kreppu. Støðan í dag er ikki heilt tann sama sum í tá. Aðalmálið er at endurreisa forbrúkaraálitið.

Av tí, at amerikanski búskapurin er soleiðis háttaður sum hann er, t.e. m.a. liberaliseraður, merkir at ætlanin hjá Bush kann koma at virka. Í Japan hava teir eisini í fleiri ár roynt at bjarga teirra búskapi eftir sama leisti, men uttan úrslit. Hetta skyldast m.a., at bankar og virki hava verið knýtt rættuliga tætt at hvørjum øðrum.

Enn er nýggjasta ætlanin hjá Bush ikki farin at virka, men tað tykist sum um, at tað er ein rættiliga breiður politiskur vilji aftanfyri hetta.

Listastevnan:

# Sjúrðakvæðini reyði tráðurin

**Fyrireikingarnar til Listastevnuna eru komnar somikið áleiðis, at partar av skránni at kalla eru fingnir upp á pláss. Sjúrðakvæðini skulu eftir ætlan vera eitt slag av einum reyðum tráði**



*Ætlanin er, at sjónleikur skal fylla størsta partin av listastevnuni komandi ár. Í tí sambandi verður ein norðurlendsk dramatikaravirðisløn latin á stevnuni. Jóanes Nielsen skal innstillast fyri leikin "Eitur nakað land weekend".*

LISTASTEVNA
*Heri á Rógvi*

Listastevnan í ár fekk rættiliga nógva umrøðu, bæði áðrenn og aftaná. Arbeiðið við at fyrireika listastevnuna komandi ár er eisini ígongd í løtuni. Tað eru nógv viðurskifti, sum skulu fáast upp á pláss. Formaðurin í stýrinum fyri listastevnuna, Birgir Kruse, sigur við Sosialin, at arbeiðið gongur sína gongd í løtuni og at okkurt spennandi er at hóma.

Arbeitt verður m.a. við nøkrum stórum nøvnum, men nøvnini á hesum vil formaðurin ikki útvið, tí samráðingarnar eru loyniligar.

Stevnan verður eftir hildin 3. til 18. august komandi. Hetta er nakrar dagar longri enn í ár, og skyldast hetta, at skráin í ár er meira umfatandi.

Millum teir meira forkunnugu bitarnar á stevnuna nevnir Birgir Kruse, at fleiri nýggj klassisk tónleikaverk verða framførd. Ætlanin er, at danskir tónleikarar, sum rópa seg fyri athelas, skulu framføra nýggju verkini.

Eisini er ætlanin at heita Enekk um at framføra nýggj verk. Hetta er í sambandi við, at tað eru 25 síðani at Tutl varð stovnað.

Í løtuni verður eisini arbeitt við at søkja um stuðul ymsastaðni frá. Tað eru Norðurlandahúsið, Tórshavnar Kommuna og Mentamálastýrið, sum so at siga standa fyri at fíggja grundupphæddina. Hon liggur um 1,2 mió. kr.

### Sjúrðakvæðini

Birgir Kruse veit eisini at siga, at Sjúrðakvæðini eftir ætlan skulu vera reyði tráðurin á stevnuni komandi ár. Hetta kemur at síggjast aftur ymstaðni á stevnuni. Ì løtuni samráðast teir við ein leikbólk, sum hevur verið í New York nýliga og framført íslendsku eddu kvæðini. Leikbólkurin kallar seg fyri Sequenta, og hevur bólkurin víst stóran áhuga fyri at koma til Føroya. Hetta skyldast serliga, at íslendsku eddukvæðini sigast at vera sprotin úr tí sama sum Sjúrðakvæðini, og bólkurin kundi hugsað sær at kunnað seg meira um føroysk kvæði. Tað er í sambandi við tónleikin, at bólkurin hevur áhuga fyri hesum. Tónleikurin rúmar ein rættiliga stóran part av framførslunum hjá bólkinum.

### Sjónleikur

Birgir Kruse sigur, at seinasta ár var tað soleiðis, at tað var tónleikurin, sum átti størsta partin av stevnuni. Men soleiðis verður ikki komandi ár, hóast tað framvegis verður tónleikur á stevnuni. Ætlanin er heldur, at tað skal vera sjónleikur, sum kemur at mynda størsta partin av stevnuni. Munandi fleiri sjónleikir vera á skránni. Ætlanin er, at hetta bæði skal umfata leik á palli og í útvarpi.

Í hesum sambandi verða eisini tvær virðislønir latnar á stevnuni. Onnur er ein norðurlendsk dramatikara virðisløn, sum Nordisk Teaterunion stendur fyri. Henda virðislønin er 50.000 kr, og verður hon latin á hvørjum ári. Ein sjónleikur úr hvørjum Norðanlandi kann vera við í kappingini. Av leikhúsinum Gríma verður upplýst, at Jóanes Nielsen eftir ætlan verður innstillaður til hesa virðislønina fyri leikin »Eitur nakað land weekend«. Leikurin verður í tí sambandi væntandi latin út í bók saman við hinum innkomnu uppskotunum. Arbeiðið við at umseta leikin skuldi ikki verið nakar trupulleiki, siga tey frá Grímu.

Hin virðislønin verður eisini 50.000 kr. Hetta verður latið fyri útvarpsleikir. Hetta verður skipað sum kapping eftir sama leisti sum stuttsøgukappingin varð í ár.

Fyrireikingarnar halda fram til stevnuna komandi ár. Komandi mánað verður fundin umboðsráðsfundur hildin, har tað verður gjørt upp, hvussu langt arbeiðið er komið higartil.

